# Sambýli til sálarsjúk gerast í Suðuroynni

**Sinnisbati fer at mæla til, at eitt sambýli til sálarsjúk verður gjørt í Suðuroynni beinanvegin. Peningur er tøkur til endamálið**

SÁLARSJÚK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hetta eru tey, sum manna lokalnevndina hjá Sinnisbata í Suðuroy. Frá vinstru eru tey Heidi Eyð Strøm á Tvøroyri, nevndarlimur, Birita Olsen í Hvalba, nevndarlimur, Peina Poulsen í Trongisvági, nevndarlimur, Jan Poulsen í Hvalba, tiltakslimur, Marit Poulsdóttir á Tvøroyri, nevndarlimur, Malan Klakkstein Vilhelm í Vági, tiltakslimur, Gudrun Olsen úr Hvalba, nevndarlimur og Óluva Poulsen í Hvalba, tiltakslimur*

Stendur tað til sinnisbata, verður sambýli til sálarsjúk gjørd í Suðuroy.

Tað er eitt úrslit av fundinum, sum felagið hjá teimum sálarsjúku hevði í Suðuroy mikukvøldið.

Mikukvøldið helt Sinnisbati almennan fund á Hotel Øravík, har greitt varð frá virkseminum hjá felagnum og har greitt varð frá ætlanunum hjá landsstýrinum at at skipa økissálarfrøði og sosialsálarfrøði.

Endamálið við er at tað skal bera til hjá sálarsjúkum at fáa ambulanta viðgerð í nærumhvørvinum heldur enn at noyðast til Havnar hvørja ferð.

Tað verður hildið, at hetta er nógv betri fyri sjúklingarnar og teirra avvarðandi.

Men tað er eisini ein stórur trupulleiki, at 40-50 seingjarpláss av teimum 70, sum eru á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, verða nýtt til sjúklingar, sum ikki hava tørv á at verða innlagdir.

### Flyta inn næsta ár

Í hesum sambandi er eisini ætlanin at byggja sambýli til sálarsjúk og á fíggjarlógini í ár eru tvær milliónir settar av til endamálið.

Á fundinum í Øravík mikukvøldið varð víst á, at Suðuroyggin er tað økið í landinum, har tað er longst til Havnar, serliga nú tað eisini verður fast samband um Lorvíksfjørð um tvey ár, eins og tað longu er fast samband vestur í Vágar.

Sostatt varð skotið upp á fundinum, at tær báðar milliónirnar, sum eru til taks á fíggjarlógini fyri í ár til sambýli til sálarsjúk, verða brúktar í Suðuroy.

Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata ásannar, at Suðuroyggin er í eini serligari støðu, hvat ferðasambandi viðvíkur og hon tekur undir við, at sambýli til sálarsjúk verður bygt í Suðuroynni.

Sostatt sigur hon, at Sinnisbati fer at virka fyri, at tær báðar milliónirnar verða brúktar til eitt sambýli í Suðuroynni.

Í hesum sambandi verður hugsað um eitt sambýli til léttari sjúklingar, sum ikki hava fyri neyðini at vera innlagdir á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum.

Nú er lítið eftir av árinum, men Landsstýrið ætlar framvegis, at tær báðar milliónirnar skulu brúkast í ár. Sostatt ætlar Landsstýrið at tað skal vera klárt at flyta inn í sambýlið fyrst í komandi ári.

Enn er støða ikki tikin til sambýli, men Soffi Egholm metir, at talan verður um eitt sambýli til eini átta fólk.

Til teir tyngru brúkararnar, ið hava stóra hjálp fyri neyðini fyri at klára seg í gerandisdegnum, er ætlanin at byggja størri sambýli til fleiri brúkarar, ið er betri egnað til endamálið og bílligari í rakstri smærri sambýli til tyngri brúkarar.

Ætlanin er at fara undir tílíka verkætlan í 2005.

Tað er avgjørt, at Sinnisbati skal fáa sæti í bygginevndini og har fer felagið sostatt at mæla til, at fyrsta stigið á hesum øki verður tikið í Suðuroynni.

### Fingu lokalnevnd

Annars er forkvinnan í Sinnisbata seta væl nøgd við fundin í Øravík.

Eini 30 fólk vóru møtt upp og tað er meiri enn Sinnisbati hevði væntað.

Men hesin fundurin varð enn eitt dømi um, hvussu langt tað í veruleikanum er úr høvuðsstaðnum til Suðuroyar.

Fyrst var ætlanin at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður skuldi koma suður at greiða frá ætlanum landsstýrisins á økinum, men hann gav rættiliga skjótt avboð, tí hann var bundin av øðrum. Sìðani skuldi annað umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið koma suður ístaðin, men eisini tað umboðið gav avboð.

Men Almanna- og Heilsumálaráðið sendi Sinnisbata ein fyrilestur um ætlanina hjá landsstýrinum um økisspykiatri og sosialpsykiatri og so mátti formaðurin í Sinnisbata lesa tað upp!.

Tað vóru annars mong, sum saknaði politikarar á fundinum. Landsolitikari var ongin at síggja og vit halda ikki at vit gera nøkrum órætt tá ið vit siga, at bara ein einasti kommunalpolitikari í allari Suðuroy var við á fundinum. Tað var Katrin??? bygdaráðslimur í Hvalba

Á fundinum segði Ólavur Rasmussen nøkur væluppløgd orð um, hvat tað er at vera manniskja.

Og eitt endamál við fundinum var eisini at velja eina lokalnevnd undir Sinnisbata fyri Suðuroy og tað gekk væl at manna nevndina.

Seinni er ætlanin eisini at gera lokalnevndir aðrastaðni í landinum.

# Skeivt at taka oljuavgjaldið av

**– Nógvir føroyingar betala lítlan ella als onganskatt og tað er skeivt eisini at lata teir sleppa undan at betala oljuavgjald**

OLJUAVGJALD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Einasta gongdaleiðin er at lækka skattin á verkamannalønum, sigur gamli fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen*

– Tað er skeivt at taka oljuavgjaldið av.

Tað heldur Karsten Hansen, sum var fíggjarmálaráðharri í undanfarnu samgongu.

Í Sosialinum í gjár mælti Ingeborg Vinther landsstýrinum til heldur at taka oljuavgjaldið av enn at lækka skattin.

HavnarArbeiðsmannafelag tekur undir við hesum. Men tað ger gamli fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, als ikki.

Hann er talsmaður í fíggjarmálum hjá stóra andstøðuflokkinum, tjóðveldisflokkinum.

Hann ásannar at oljan er dýr. Men hann staðfestir samstundis, at oljan í Føroyum er framvegis væl bíligari enn í flest øllum øðrum londum rundanum okkum.

Og hann leggur afturat, at jú bíligari oljan er, jú meiri olju brúka fólk, so oljan verður altíð ein stór útreiðsla hjá einum húsarhaldi.

Hann vísir eisini á, at tað er ikki so lítil partur av fólkinum, sum betalir lítlan og ongan skatt, eitt nú øll tey, sum sigla undir DIS og partvís eisini tey, sum sigla undir FAS. Harumframt eru tað fyritøkur, sum forvinna væl av peningi, men sum fáa avskrivað so nógv, at tær heldur ikki betala skatt, hóast nýtslan er stór.

– Skulu øll hesi nú heldur ikki betala oljuavgjald, afturat tí at tey sleppa undan skatti til samfelagið, spyr Karsten Hansen.

### Lækka skattin

Hinvegin heldur hann, at verkafólk betala ov nógv í skatti av tí inntøku tey fáa.

– Tí er tað einasta rætta at lækka skattin av inntøkunum hjá verkafólki.

Sostatt harmast hann um, at ætlaði skattalættin hjá samgonguni gevur teimum høgu inntøkunum tann størsta lættan.

Og hann undrast eisini á, at arbeiðarafeløgini lata hetta um seg ganga.

– Tað undrar meg, at arbeiðarafeløgini gera so lítið vart við seg, nú ætlanin er at lækka skattin hjá teimum høgu inntøkunum, samstundis sum verkafólk lítlan og ongan fyrimun fáa av skattalæattanum.

– Tað hevði ikki verið ímeðan undanfarna samgonga sat, at arbeiðarafeløgini høvdu verið so friðalig í einum slíkum máli, leggur gamli fíggjarmálaráðharrin afturat.



# Ráðgevandi teimi setast í verk

**Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, svaraði tveimum munnligum fyrispurningum frá Annitu á Fríðriksmørk, løgtingskvinnu, um fosturtøku í tinginum mikudagin. Hann segði millum annað, at lóggávan treingir til at vera dagførd, og at hann fer at seta eitt ráðgevandi teimi í verk til tær kvinnur, ið umhugsa fosturtøku**

FOSTURTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, hevur ætlanir um at seta eitt ráðgevandi teimi í verk til tær kvinnur, sum umhugsa fosturtøku*

*Savnsmynd*

Tá munnligir fyrispurningar vóru fyri á tingi mikudagin, setti Annita á Fríðriksmørk Hans Paula Strøm, landsstýrismanni tríggjar fyrispurningar um fosturtøku.

Í orðaskiftinum aftaná kom fram, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at seta eitt ráðgevandi teimi í verk, sum skal hava til endamáls at ráðgeva kvinnum, ið ynskja fosturtøku framda.

Hetta teimið skal mannast av umframt einum lækna – einum sálarfrøðingi, sosialráðgeva, einum presti og einum sjúkrarøktarfrøðingi.

– Hetta skal verða eitt tilboð til tær kvinnur, ið umhugsa fosturtøku. Á hendan hátt verða kvinnur vegleiddar og harvið betur førar fyri at taka eina slíka avgerð, segði Hans Pauli Strøm.

### Danskt málsøki

– Hvat heldur landsstýrismaðurin um galdandi lóggávu á fosturtøkuøkinum? Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at broyta galdandi lóggávu í hesum valskeiðinum, og um so er, hvørjar broytingar kunnu væntast?

Hetta vóru teir tríggir spurningarnir, sum Annita á Fríðriksmørk setti Hans Paula Strøm, landsstýrismanni.

Landsstýrismaðurin svaraði, at tað er ongin ivi um, at galdandi lóggáva er gomul, og tískil kann tað verða, at dagføringar verða gjørdar á hana, so at hon gerst meiri tíðarhóskandi. Hann vísti á, at í verandi lóggávu sampakkar uppfatanin av kvinnuni als við nútíðina.

Viðvíkjandi beinleiðis broytingum á lóggávuna, segði Hans Pauli, at tað hevur løgtingið ikki heimild til, tí at ein rammulóg um tað føroyska heilsuverkið, sum varð gjørd í 1995, ikki umfatar fosturtøkuøkið.

– Tískil má økið yvirtakast ella ein fólkatings-lógarbroyting til, um verandi lóggáva skal broytast, segði landsstýrismaðurin í svari sínum til Annitu á Fríðriksmørk.

# Orðaskifti stendur í stað

**Tað kom ikki nógv nýtt fram undir orðaskiftinum um fosturtøku í tinginum mikudagin. Annita á Fríðriksmørk, Hans Pauli Strøm, Jákup Mikkelsen, Jenis av Rana og Bill Justinussen tóku orðið**

FOSTURTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Orðaskiftið um fosturtøku á tingi mikudagin var ikki drúgt, og synd er at siga, at nakað nýtt kom fram*

*Savnsmynd*

Orðaskifti á tingi um fosturtøkumálið var ikki drúgt. Fyri uttan Annitu á Fríðriksmørk tóku bert mannfólk orðið, og allir søgdu seg vera í móti fríari fosturtøku. Tó segði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, ikki nakað ítøkiligt um sína støðu til spurningin.

Bill Justinussen helt ikki, at orðaskifti um fosturtøku hevur ligið á laku síðuni.

– Mær vitandi hevur hetta kjakið verið frammi fleiri ferðir, og tað letur til, at tað er tann sama niðurstøðan hvørjaferð. Vit føroyingar gleðast um verandi lóggávu, og kanska ein meiriluti av Føroya fólki hevði verið fyri at stramma lógina upp, segði Bill Justinussen.

Hann vísti eisini á, at hann saknaði rættin hjá barninum í tosinum hjá Annitu.

Jenis av Rana eftirlýsti eisini rættin hjá barninum í øllum kjakinum. Men hann hevði sjálvur eitt uppskot um orsøk til, at tað ikki bleiv nevnt.

– Tá ein hugsar um fosturtøku, so er ein noyddur at kopla heilan frá. Barnið verður ongantíð nevnt í slíkum, tí ein kann ikki tosa um barnið, tá tað ræður um fosturtøku, segði Jenis. Hann legði út við at siga, at tann daprasti dagurin í søguni mundi vera hann, tá tann fyrsta fosturtøkan varð framd.

Annita á Fríðriksmørk royndi at fáa kjakið inn á rættindini hjá kvinnuni. Hon segði, at endaliga avgerðin liggur bara einastaðni, og í hennara verð er kvinnan betur egnað til at taka avgerðina enn ein lækni, sum støðan er í dag.

Orðaskiftið á tingi var ikki drúgt, og sum nevnt kom ikki nógv nýtt fram. Tó er tað undrunarvert, at tað bert var tann eini persónurin í tingsalinum, sum er fyri fríari fosturtøku, ið valdi at standa fram. Hinir tríggir vóru ímóti. Um hetta gevur eina rætta mynd av, hvør støða Føroya Løgting hevur til fosturtøkuøkið, er ikki gott at vita. Men um ikki fleiri velja at standa fram við teirra støðu, tað veri seg fyri ella ímóti, so verður torført at førka kjakið.

## Fólkaflokkurin ímóti



Í orðaskiftinum á tingi mikudagin um fosturtøku segði Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður, at Fólkaflokkurin ikki tekur undir við einari liberalisering av verandi fosturtøkulóg.

Hann helt tó, at hetta er eitt álvars mál, sum skal takast upp í einum orðaskifti.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, tók so orðið aftur og segði, at dagføring av lóggávuni ikki prinsippielt merkir, at hon skal liberaliserast. Jákup Mikkelsen spældi út við sjónarmiðinum hjá øllum sínum flokki, meðan Annita á Fríðriksmørk nýtti høvi til at undirstrika, at hetta var hennara persónliga sjónarmið - og ikki eitt flokssjónarmið.

**- sae -**

## Jólini nærkast




Nú oktober nærkast endanum, byrja tankarnir uttan iva at snúgva seg um jólaborðhaldini. Hotel Norð á Viðareiði bjóðar viðskiftafólkum eina stóra jólabuffét við 35 ymiskum rættum. Har bæði felagssangur og undirhald verður undir borðhaldinum.

Jólaborðhaldini verða hildin trý kvøld. Tað fyrsta verður tann 20. november, tað næsta 27. og tað seinasta tann 11. desember.

Av hotellinum verður sagt, at almennur dansur verður eisini frá midnátt øll trý kvøldini við ymiskum bólkum. Somuleiðis er møguleiki fyri at gista.

Bussur koyrir til og frá Viðareiði, og borð kunnu bíleggjast á tlf. 457020

**- sae -**